Løgmaður:

# – Hví Visjón 2015?

Visjónin er, at Føroyar í 2015 vera millum bestu lond at virka og liva í. Vit ynskja, at Føroyar skulu verða samfelag við sterkum búskapi, har arbeiði er til allar hendur, og har dygdargóðar, sosialar skipanir tryggja øllum eitt virðiligt lív.

Skulu vit røkka hesum máli, er neyðugt við greiðum og framsóknum ætlanum. Tað er tað, vit vilja við Visjón 2015. Og vit ynskja, at hvør einstakur gevur sítt íkast. Føroyar standa á einum vegamóti.

Hetta krevur, at stórar avgerðir verða tiknar. Tað eru avgerðirnar, vit taka nú, sum skulu vísa, um vit megna at tillaga okkum treytirnar í einum alheimsgjørdum búskapi.

Tað var í hesum anda, at landsstýrið um ársskiftið setti sær fyri at gera eina heildarætlan - eina strategi - fyri samfelagið. Eina ætlan, sum røkkur nógv longri enn hetta valskeiðið.

Visjónin byggir á 12 grundarsteinar. Men endamálið er hin 13. grundarsteinurin - nevniliga vælferðin. Tað er vælferðin hjá hvørjum einasta borgara í landi okkara, sum vit vilja tryggja.

Visjón 2015 er ikki ein fjarur dreymur. Visjón 2015 er tað, vit seta í verk nú. Tær leiðir, vit í felag velja at ganga í dag."




## FAKTA

Visjónstorgið

At arbeiða við visjónsætlanini eru settir 12 strategibólkar. Hesir fara at arbeiða við evnunum, ella grundarsteinunum, su m landsstýri† hevur ásett. Uppgávan hjá bólkunum verður at seta mál fyri hvørt øki sær. Teir skulu staðfesta umráðandi trupulleikar og avbjóðingar, og teir skulu orða eina ætlan fyri, hvussu vit røkka málunum.

Í hesum sambandi er ætlanin at hava eitt visjónstorg. Endamálið hjá hesum visjónstorgi er at gera viðmerkingar til ávegisfrágreiðingar, sum strategibólkarnir orða um grundarsteinarnar.

## ALLÝSINGIN HJÁ TEIMUM 12 BÓLKUNUM

### SJÁLVSTÝRI

Sjálvstýri fevnir í hesum høpi um at leggja til rættis eina skipaða tilgongd í Føroyum, ið hevur við sær, at føroyski búskapurin verður sjálvberandi, og at Føroya fólk verður sjálvstýrandi.

Leisturin fyri sjálvstýris-tilgongdini skal gerast við langtíðaráhugamálum Føroya fólks í huga.

Visjónin um sjálvstýri skal fevna um:

- Stjórnarskipan fyri Føroyar
- Yvirtøkur av málum og málsøkjum
- Stigvísa minking í heildarveitingini

### ALHEIMSGERÐ

Alheimsgerð fevnir í hesum sambandi um at taka burtur forðingar fyri at flyta vørur, tænastur, kapital og arbeiðsmegi millum lond og at stimbra, at Føroyar og føroyingar í allar mátar verða virkin og hollur partur í altjóðaligum høpi.

Visjónin um alheimsgerð skal fevna um:

- Økt politiskt samstarv við umheimin
- Luttøku í norðurlendskum samstarvi
- Limaskap í EFTA
- Sáttmála um tey fýra frælsini við ES
- Styrkta føroyska umboðan í ES
- Føroyska sendiumboðan í fleiri londum
- Samstarv við viðkomandi partar av ST-kervinum
- Limaskap í altjóða felagsskapum
- Fríhandilssáttmálar
- Skattasáttmálar
- Útbúgvingar- og gransk-ingarsamstarv
- Neyð- og menningar-arbeiði

### ÍVERKSETAN

Tað er avgerandi fyri búskaparligu menningina av einum samfelag, at íverksetarar hava góðar umstøður, soleiðis at vinnuliga virksemið veksur og gerst meiri fjølbroytt.

Íverksetan er tann dynamiska tilgongdin, ið er at finna búskaparligar møguleikar, og á hesum grundarlagi at menna, framleiða og selja vørur og tænastur.

Visjónin um íverksetan skal fevna um:

- Íverksetanarhugburð
- Íverksetaraskipanir
- Fíggingarmøguleikar
- Skattlig viðurskifti
- Greiðar lógarkarmar og reglur
- Smidliga almenna fyrisiting

### TILFEINGI

Tilfeingi fevnir her um landsins tilfeingi, ið skal gagnnýtast soleiðis, at tað gevur stórst avkast, umframt framburð og vælferð.

Tilfeingi kann bara verða gagnnýtt við loyvi frá landsins myndugleikum. Tey, sum fáa loyvi at nýta landsins tilfeingi vinnuliga, skulu fylgja almennum treytum um gjøld og burðardygga gagnnýtslu.

Almennu karmarnir skulu tryggja støðugt grundarlag undir vinnuligum framburði og búskaparligum vøkstri við atliti at samfelagsliga rættvísum býti av vinningi og burðadyggari gagnnýtslu.

Visjónin um tilfeingi skal fevna um:

- Fiskastovnarnar
- Alifirðir
- Kolvetni
- Landsjørð

### SAMFELAGSBYGNAÐUR

Samfelagsbygnaður fevnir um býtið millum alment og privat, býtið millum land og kommunur, skattaskipanir og marknaðarbrek so sum serskipanir og ávísar stuðulsskipanir.

Visjónin um samfelags-bygnaðin skal fevna um:

- Býtið millum alment og privat (eingskiljingartilgongd)
- Býtið millum land og kommunur (kommunur-eformur, íroknað broyting í skattaskipan)
- Kapitalmarknað (t.e. fíggingar-, tryggingar- og virðisbrævamarknaður)
- Skatta- og avgjalds-politikk
- Studningsskipan

### UMHVØRVI

Umhvørvi fevnir um jørðina, havið, luftina og vatnið, umframt tey virði og tað tilfeingi, ið har finst frá náttúrunnar hond.

Almennu karmarnir skulu/eiga at tryggja, at menningin av samfelagnum verður skipað við virðing og fyriliti fyri umhvørvinum, soleiðis at komandi ættarlið áhaldandi hava góðar treytir at virka undir.

Visjónin um umhvørvi skal fevna um:

- Góðskukrøv til jørð, hav, luft og vatn
- Vinnu og útlát
- Orku og veðurlags-broytingar
- Lendisskipan og lendis-nýtslu
- Fjølbroytta náttúru
- Frítíð og náttúru
- Tilfeingi og nýtslu
- Agenda 21, upplýsing og hugburð
- Umhvørvið og umheimin
- Fyrisiting og avgjøld

### KUNNINGAR- OG SAMSKIFTISTØKNI

Nýtslan av kunningar- og samskiftistøkni (KST) í einum samfelagi hevur stóran týdning fyri framleiðnið í búskapinum og sostatt eisini fyri búskaparvøksturin. Ein økt KST-nýtsla í samfelagnum sum heild hevur positivar avleiðingar á KT-vinnuna, og tað ræður um at føroysk KT-virki skulu hava møguleika at bjóða seg fram, tá ið landið spyr eftir KT-tænastum.

Visjónin um kunningar- og samskiftistøkni skal fevna um:

- KST-undirstøðukervið
- KST-ætlan fyri útbúgvingar-verkið
- KST-ætlan fyri almenna fyrisiting
- KST-ætlan fyri samskiftið millum tað almenna og borgararnar

### GRANSKING, MENNING OG NÝSKAPAN

Gransking fevnir um at betra vitanarstøðið í síni heild, at stimbra nýhugsan og nýmenning, umfamt at styrkja kappingarførið. Tað er tað grundleggjandi virksemi, ið skal stimbra hugskotsmenning, so at nýggir vinnumøguleikar verða skaptir.

Visjónin um gransking skal fevna um:

- Fíggjarligar karmar – privat og alment
- Útbúgvingarmøguleikar heima og uttanlands
- Lokkandi granskingar-umhvørvi fyri føroyingar og útlendingar
- Vælferðartænastur til ungar familjur
- Skattlig viðurskifti
- Ágrýtið og fjølbroytt vinnulív
- Gransking í samfelags-bygnaðarligum høpi
- Tryggja formlig altjóða-viðurskifti innan gransking

### ÚTBÚGVING

Fremsta endamál við útbúgvingarpolitikkinum er at styrkja og menna okkara samleika sum tjóð og at menna okkara mál.

Undirvísingin skal mennast, so at allir føroyingar í størri mun enn í dag fáa holla útbúgving, soleiðis at ein størri partur av føroyingum fer undir framhaldandi og hægri útbúgving.

Útbúgvingarskipanin skal fyrireika næmingar og lesandi til ein alsamt meira altjóðagjørdan heim, har tað er ein fortreyt, at ein dugir at samskifta við fólk frá øðrum mentanum og við øðrum tungumálum.

Visjónin um útbúgving skal fevna um:

- Fólkaskúlan
- Miðnámsskúlaútbúgvingar
- Hægri útbúgvingar
- Vaksnamannaútbúgvingar

### ARBEIÐSMARKNAÐUR

Tað er av alstórum týdningi fyri hin einstaka og fyri vinnuna

- at arbeiðsmegin er flytfør
- at hin einstaki hevur ella kann fáa sær eftirspurdar førleikar
- at friður valdar á arbeiðs-marknaðinum
- at tað eru skipanir, sum gagna hinum einstaka

Visjónin um arbeiðs-marknaðin skal fevna um:

- Smidligar skipanir fyri útvegan av arbeiðsmegi
- Førleikamenning av arbeiðsmegi
- framhaldandi eftirút-búgvingarskipanir
- Skipanir at forða fyri og at loysa trætumál skjótt
- Persónligar eftirlønar-skipanir, sum samvirka við fólkapensión og samhaldsføstu arbeiðs-marknaðarskipanin

### MENTAN

Mentan fevnir í hesum høpi um, at vit hava ein greiðan mentanarpolitikk og góðar umstøður, soleiðis at mentanarlívið mennist og gerst fjølbroytt, til gagns fyri tjóðarmentanina, samfelagsmenningina og samfelagstrivnaðin sum heild.

Visjónin um mentan skal fevna um:

- Byggja út og dagføra arbeiðið "Mentan og menning 2002-2006"
- Gera ætlan fyri at varðveita og styrkja mentanararvin
- Allýsa leiklutin hjá politiska myndugleikanum
- Samstarv millum land og kommunu um mentanarátøk
- Mentanarráð
- Samstarv millum mentan og vinnu
- Karmar viðvíkjandi skapandi list

### INFRAKERVI

Eitt gott infrakervi í Føroyum og millum Føroyar og útheimin er týdningamikil fortreyt fyri trivnaði hjá borgarum og vinnulívi og fyri at javnstilla ymsu økini í landinum.

Infrakervi, ella íløgur í infrakervi, fevnir í hesum sambandi um tær íløgur, sum gera tað lættari, skjótari ella bíligari at ferðast, og sum økja um flytførið og samskiftið.

Tað er umráðandi at rað-festa íløgur í infrakervið í Føroyum rætt.

Visjónin um infrakervi skal fevna um:

- Eina samferðsluætlan fyri skip, vegir, havnir og flogvøllir
- Fígging av samferðslu-kervinum